# 30 ár við Idé Møblum



**Tað eru brátt 30 ár síðani, at Idé møblar byrjaði í Føroyum. Hesi 30 árini hevur fyritøkan verið frammi í oddinum og gjørt vart við seg. Nú er jólasølan í hæddini og hjá Idé gera alt fyri, at kundin skal kenna seg væl og nógv góð tilboð eru eisini**

Fyrsta dagin eru 30 ár síðani, at Idé byrjaði í Føroyum. Í februar komandi kann fyritøkan halda 30 ára dag í Føroyum.

Fyritøkan hevur øll árini verið heilt frammi í oddinum og hevur alla tíðina gjørt vart við seg.

Umframt innbúgv til privatu heimini og til virkir, hevur Idé eisini stóra gávudeild, har alskyns prýði til heimini er at fáa.

-Nú tosað verður um afturgongd búskaparliga, so leiðir tað hugan aftur til truplu árini fyrst í 90'unum. Vit høvdu tá bygt nýggjan handilsbygning, sum glapp av hondum. Men vit eru nú betri fyri, og betri brynjaði at taka eina møguliga niðurgongd, sigur Birgir Andreasen, stjóri í Idé Møblum.

Í ár 2000 bygdi Idé aftur nýggjan bygning og hava tey havt 8 sera góð ár í nýggju húsunum.

## Ársins Handil

Idé hevur verið kosið Ársins handil øll árini, ið fyritøkan hevur luttikið í kappingini, og tað vil siga 5 ferðir.

- Tað hevur gingið væl, og vit hava góð, støðug og trúføst starvsfólk, sigur Birgir Andreasen.

## Jólasølan í hæddini

Nógv fólk vitjar inn á gólvið hvønn dag hjá Idé, og har gera tey eisini alt fyri, at kundin skal kenna seg væl

Nú jólasølan er í hæddini, eru eisini nógv góð tilboð hjá Idé.

Eitt, sum ger Idé eitt sindur øðrvísi, enn flestu handlar, er at tey hava ikki opið síðsta sunnudag fyri jól.

- Vit brúka dagin saman við starvsfólkunum, makum og børnum teirra. Vit eru tá eini 52 fólk saman til eina jólaløtu og hugna okkum saman, sigur Birgir Andreasen.

20 fólk arbeiða hjá Idé Møblum.

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*











